Fiski- og tilfeingismálaráðið

FISKIVINNU GRANSKING

# Fiskivinnuroyndir 2009
## Lýsing eftir umsóknum

Fiskivinnuroyndir er játtan hjá Fiski- og tilfeingismálaráðnum, sum stuðlar royndir og kanningar – bæði praktiskar, vinnuligar og vísindaligar, ið menna og økja um framleiðni í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfanginum

**Verkætlanir, sum stuðul kann søkjast til, eru skipaðar í trý høvuðsøki:**
- Burðardyggur fiskiskapur
- Royndarveiða og virðisøking av fiski
- Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni

Innanfyri høvuðsøkini verður í ár lagdur dentur á at fáa verkætlanir, sum kunnu hava orkusparing við sær.

**Serligur dentur verður lagdur á, at:**
- vinnan tekur lut í verkætlanini
- eginfígging ella onnur fígging er
- samstarv er við samstarvsfelagar í Føroyum (almennar og/ella privatar) og/ella uttanlands.
- at verkætlanin er skipað við einum stýrisbólki at fylgja við gongdini

Fyritøkur, almennir stovnar og einstaklingar kunnu søkja um stuðul úr Fiskivinnuroyndum.

Víst verður á, at møguleiki eisini er hjá vinnuni at søkja um stuðul til setan av vinnugranskara innanfyri omanfyrinevndu økir við fígging upp til 50%[1].

Um tørvur er á at orða hugskot til ítøkiligar verkætlanir ber til at seta seg í samband við samskiparan um hetta.

Umsóknir skulu verða samskiparanum í fiskivinnugransking í hendi í seinasta lagi mikudagin 15. okt. 2008, kl. 12:00

**Meira fæst at vita:**
Programm, umsóknarbløð, vegleiðingar og annað kunnandi tilfar fæst á heimasíðu okkara www.fvg.fo

Áhugaði eru vælkomin at venda sær til Jákup Mørkøre, samskipara við møguligum spurningum.

Fyrivarni verður tikið fyri játtan á løgtingsins fíggjarløg fyri 2009.

**Jákup Mørkøre, samskipari**
tlf.: 35 30 30 / 35 32 48
fartel: 55 32 48 (fyrr 21 73 69)
t-post: jakupmo@fisk.fo

**Umsóknir skulu sendast til:**
Fiski- og tilfeingismálaráðið
Samskiparin í fiskivinnugransking
P.O.Box 347
Heykavegur 6A
FO-110 Tórshavn

[1] max. 300 kkr./ár í 3 ár



# Kunngerð

um valevnislistar til kommunuvalið í Sørvágs kommunu 11. nov. 2008.

Í Sørvágs kommunu kann ein valevnislisti hava til og við 11 valevni.

Valevnini skulu vera skilliga lýst við navni, starvi, føðingardegi og bústaði.

Listin skal vera undirskrivaður av í minsta lagi 15 og í mesta lagi 25 veljarum sum stillarum. Hjálagdur skal vera ein serligur listi yvir stillararnar, hvar teir eru skilliga lýstir við navni, starvi og bústaði.

Ein persónur kann bara vera stillari á einum lista.

Listin skal latast inn av einum stillara til kommununa ella valnevndarformannin í seinasta lagi týsdagin 21. oktober 2008 kl. 18.00.

Sørvágur, 30. september 2008

V.v

Oddur Petersen, form.

Sørvágs Kommuna



# Handil til sølu

Um nøktandi boð fæst verður handilin Barnaútgerð Bambino í Klaksvík seldur

Áhugaði kunnu ringja á tlf. 458844 / 216919

Bambino barnaútgerð



## Tilnevning av Turið Sigurðardóttur sum professara á Fróðskaparsetri Føroya

Í sambandi við setan av professara á Fróðskaparsetri Føroya verður hátíðarhald, har Turið Sigurðardóttir heldur fyrilestur.

Heitið á fyrilestrinum er:

**Leikum fagurt á foldum.**
**Kvæðini í føroyskum nútíðarbókmentum**

Hátíðarhaldið verður í Loftsstovuni, á Føroyamálsdeildini **fríggjadagin 3. oktober 2008 kl. 15.00.** Adressan er V.U. Hammershaimbs gøta 16.

**FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA**
Setursskrivstovan, tlf. 35 25 00
J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272
110 Tórshavn
www.setur.fo



# ÚTBJÓÐING
## STRANDA SKÚLI
### - útbygging -

Sjóvar kommuna bjóðar hervið arbeiðið at útbyggja Stranda skúla út í almenna lisitatión greinað í hesar arbeiðstøkur:

1. Stórarbeiðstøka, sum fevnir um byggipláss-, niðurtøku-, jørð-, kloakk-, betong-, stál-, timbur- og snikkaraarbeiði
2. Múraraarbeiði
3. Málaraarbeiði
4. Gólvarbeiði
5. HVS-arbeiði
6. El-arbeiði

Útbjóðingartilfarið fæst frá týsdegi 07. oktober við at gjalda veðhald á ávikavist kr. 20.000.- fyri arbeiðstøku 1. og kr. 5.000,- fyri hinar arbeiðstøkurnar á konto 4132607 í Norðoya Sparikassa í seinasta lagi mánadagin tann 06. oktober og venda sær til Fuglø Arkitektar við váttan um, at upphæddin er goldin. Málsheiti og arbeiðstøka skal vera greitt tilskilað á flytingarváttanini.

Lisitatiónin verður týsdagin 04. november kl. 15.00 í bygdarráðshúsinum hjá Sjóvar Kommunu.

**FUGLØ ARKITEKTAR**
Gerðagøta 12, FO-700 Klaksvík
Tlf. 45 78 87 - Fax 45 78 97
www.fuglark.fo
fuglark@fuglark.fo





**VW Golf 2.0 TDI**

**VW Golf 2.0 TDI Sportline** við 140 hk. Bilurin er frá 24/4-06. Hevur koyrt 18.000 km. Nógva eykaútgerð, t.d: DK-pakki við klima, RCD 500 anlegg við 10 hátalarum, metallakk, leðurróður, multifunktiónsanlegg plus, tokulyktir, ljós + sjón pakki, o.a.

Nýprísur: kr. 350.000,-

**Prísuppskot kr. 250.000,-**

**Ring 510 298 ella 210 298**